

*– Vit eru helst tað seinasta landið í vesturheiminum, sum ikki hevur eina kunningardeild á hægsta stjórnarstøði, sigur nýsetti kunningarráðgevin á løgmansskrivstovuni, Bjørt Samuelsen*
*Mynd: Jens K. Vang*

# Bjørt fer yvir um borðið

**Tíðindakvinnan Bjørt Samuelsen hevur júst fingið starv sum kunningarráðgevi á Løgmansskrivstovuni. Eitt nýtt og spennandi starv, sum er fylt við avbjóðingum, sum Bjørt gleðir seg til at fara í holt við. Men samstundis merkir tað, at hon er farin yvir um borðið**

SAMRØÐA
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Bjørt Samuelsen hevur verið tíðindakvinna í meira enn tíggju ár. Royndirnar eru nógvar — bæði í norskum og føroyskum fjølmiðlum. Hon hevur arbeitt í loftmiðlunum í Føroyum, har hon mangan hevur sett politikarum spískar og kritiskar spurningar.

Nýggja starvið fevnir um nógv. Millum annað skal Bjørt sum kunningarráðgevi læra upp og vegleiða í samskifti við fjølmiðlarnar.

Hon sigur, at hon var nakað í iva, um hon skuldi søkja starvið. Tí hon er glað fyri tað, sum hon ger. Bjørt dámar sera væl at vera journalistur. Seinasta árið hevur tó arbeitt sum free-lance. Tað hevur latið dyrnar upp fyri uppgávum av øllum møguligum slagi. Men hóast tað, so var hon aftur at síggja á skíggjanum til valsendingina hjá sjónvarpinum til løgtingsvalið í ár. Men ikki til júst farna kommunuval.

– Eg segði upp í sjónvarpinum, tí eg vildi hava vald á mínari egnu tíð, sigur roynda tíðindakvinnan.

Hon ætlaði sær umframt at arbeiða eisini at hava tíð til at baka, seyma og hugna sær, men flennandi greiðir hon frá, at tað als ikki hava verið stundir til tað.

— Eg eri tó ofta heima, tá børnini koma heim, men eg havi gjørt simpulten so nógvar og fjølbroyttar uppgávur, síðani eg fór úr sjónvarpinum, greiðir Bjørt frá.

Nú hevur hon so ein mánað ella so at fáa allar snøklarnir upp á pláss, áðrenn hon byrjar í nýggja starvi sínum á løgmansskrivstovuni um hálvan desember.

## Samskipa kunningina

Bjørt Samuelsen skal sum kunningarráðgevi á løgmansskrivstovuni samskipa kunningina úteftir. Hendan hevur verið nakað tilvildarlig, og har heldur Bjørt, at Føroyar mugu sigast at vera ein eftirbátur.

– Vit eru helst tað seinasta landið í vesturheiminum, sum ikki hevur eina kunningardeild á hægsta stjórnarstøði, heldur hon fyri.

Men hon ivast samstundis ikki í, at hetta nýggja starvið er ein liður í, at umsitingin skal gerast meiri opin, sum tað stendur í samgonguskjalinum.

Bjørt leggur tó dent á, at hon kemur ikki at virka sum ein liður millum landsstýrismenn og fjølmiðlar.

Sum er kunnu tíðindafólk so at siga, tá tað passar teimum fáa fatur á ráðharrum ella politikarum, sum tey hava brúk fyri. Við eitt nú at ringja á teirra fartelefon ella umvegis teldupost.

Hóast hon ikki kemur at ávirka tað á nakran hátt, so setur Bjørt spurnartekin við, hvussu smart tað er, at tíðindafólk venda sær beinleiðis til landsstýrismannin.

– Tá fer alt beinleiðis í gjøgnum politiska filtrið hjá politikaranum, vísir hon á og leggur afturat, at tað kundi verið eitt gott hugskot at upplært embætisfólkini at samskifta við fjølmiðlarnar. Tí nevniliga hesi sita ofta við einari breiðari vitan um ymisk mál.

Bjørt heldur, at tað ofta letur til, at sambandið millum til dømis umsiting og fjølmiðlar ikki er so gott. Hon heldur, at tað ræður um at fáa serliga embætisfólk trygg við fjølmiðlarnar.

Spurd um hon ikki fer at virka sum ráðgevi fyri løgmanni serliga, svarar Bjørt, at hon kemur at verða ráðgevi bæði fyri løgmanni og landsstýrinum.

– Løgmaður er so mikið royndur í politikki, at honum tørvar ikki, at eg sigi honum hvat og hvussu hann skal bera seg at yvir fyri fjølmiðlunum, men eg komi jú at sita á løgmansskrivstovuni. Mín uppgáva verður í stóran mun at samskipa kunningina frá Stjórnardeildini, sigur Bjørt.

## Sama hugburð

Starvið sum kunningarráðgevi fevnir um, at Bjørt skal vera ráðgevi fyri landsstýrinum og allari umsitingini, hon skal samskipa kunningarvirksemið hjá landsstýrinum, tilrættisleggja sambandið hjá umsitingini og politikarunum við fjølmiðlarnar og evna til politikk og virkisætlan fyri almennari kunning stóð í starvslýsingini.

– Tað er vónleyst hjá mær at siga nakað nágreiniligt um, hvussu arbeiðið kemur at verða, men tað er ongin ivi um, at hetta fevnir breitt, staðfestir Bjørt.

Bjørt kemur eisini inn á spurningin um alment innlit. Tað er eitt mál, sum hongur nakað ofta í leysari luft, og hugburðurin er ógvuliga ymiskur millum ráðini og stovnarnir.

– Tað skuldi bara mangla, at hugburðurin til alment innlit er tann sami frá ráði til ráðs, heldur Bjørt Samuelsen.

Spurd um, hví hon sjálv heldur, at júst hon fekk starvið, svarar Bjørt speiskliga, tí hon er kvinna.

So brestir hon út úr at flenna.

– Nei, nei, nú mugu vit heldur koma víðari, ha? Eg havi drúgvar royndir, og pappírini hjá mær eru í lagi. Eg haldi, at eg lúki øll krøvini til hetta starvið, sigur Bjørt, sum ikki vil hoyra talan um, at hon skal vera ein sokallaður spindoktari fyri landsstýrið.

– Eg blívi ein sparringspartnari, og hetta starvið ger, at eg brádliga skal samskifta øðrvísi við mínar starvsfelagar. Eg kann eitt nú ikki tipsa teir longur, greiðir smílandi hon frá og leggur afturat, at hon helst ikki hevði fingið eitt starv sum spindoktari, tí hon er politiskt ólitt.

## Yvirum aftur

Um hálvan desember skal Bjørt byrja í nýggja starvinum. Hon væntar, at hennara sentrali leiklutur í starvinum verður sum samskipari av kunningini.

Hon kemur so inn aftur á hetta, at tað verður so nógv øðrvísi at arbeiða, ein øðrvísi gerandisdagur og hon skal venja seg við at vera hinumegin borðið.

– Eg fari sjálvandi at sakna umhvørvið í loftmiðlunum og fríheitina til at gera tað, eg havi hug til sum free-lancari, men eg dugi veruliga ikki at síggja nakra forðing í, at eg fari yvir um aftur borðið einaferð í framtíðini, sigur Bjørt, sum heldur, at journalistar gera tað mest spennandi og týdningarmesta arbeiðið í einum fólkaræði.

Hon vil ikki hava nakra serviðgerð av nøkrum slagi, og hevur tískil sagt við sínar starvsfelagar, at tey skulu vera líka kritisk við hana, sum hon hevði verið við tey, um onkur teirra fór starvið sum kunningarráðgevi.

– Eg var sum sagt í iva, um eg skuldi søkja, men nú eri eg glað fyri tað, og eg gleði meg at fara í gongd, sigur Bjørt Samuelsen, fyrsti kunningarráðgevin á løgmansskrivstovuni í Tinganesi, sum er sett fyribils til juni 2008.

## FAKTA

**Navn:** Bjørt Samuelsen
**Aldur:** 39 ár
**Starv:** Kunningarráðgevi á løgmansskrivstovuni
**Útbúgving:** Matvøruverkfrøðingur og journalistur
**Starvsroyndir:** Starvsvenjing á Aftenposten, meðan hon var undir útbúgving, arbeitt á Forbrukerrapporten í Noregi og síðani á sjónvarpsrásini NRK. Flutti heim til Føroya ársskiftið 2000/01 at arbeiða í Útvarpi Føroya í hálvt triðja ár, síðani í Sjónvarpi Føroya og seinasta árið sum free-lance



Barnagarður á Eiði:

# Ætlanin er at byrja sum skjótast

**Anna Maria Poulsen, sum á triðja sinni er afturvald í bygdaráðið í Eiðis kommunu, sigur, at barnagarðurin er eitt av hennara hjartamálum, og hon vónar, at tað ikki fer at taka alt ov langa tíð, til spakin verður settur í, og barnagarðurin stendur liðugur**

EIÐI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Nývalda bygdaráðið í Eiðis kommunu, sum tekur við 1. januar 2005, fremst tv.: Jógvan K. Mørkøre, Tordur J. Niclasen og Tom Skaale. Aftast, tv.: Anfinnur Kruse, Anna Maria Poulsen, Rólant Poulsen og Jóhan K. Joensen*
*Mynd: Sigrun G. Niclasen*

Anna Maria Poulsen er einasta kvinna í bygdaráðnum í Eiðis kommunu. Á valinum herfyri varð hon vald í bygdaráðið á triðja sinni, og er hon samstundis triðja kvinnan, sum hevur sitið í bygdaráðnum. Undan henni hava sitið Hildigarð Høghamar og Annvør Jacobsen.

Anna Maria er dagrøktarleiðari í Eiðis kommunu. Tað hevur hon verið í meira enn hálvt fimta ár. Í skipanini er einki loft, og í dag verða eini 60 børn ansaði í dagrøktini.

## Nýggjur barnagarður

Í kommununi er eingin barnagarður, men bygdaráðið, sum nú leggur frá sær, hevur samtykt, at barnagarður skal byggjast á Eiði. Í verandi fíggjarári er ein miljón sett av til hetta arbeiði, og á komandi fíggjarætlan er 2,5 miljónir settar av.

Anna Maria sigur, at barnagarðurin er eitt av hennara hjartamálum í bygdaráðnum, og hon vónar, at tað ikki fer at taka alt ov langa tíð, til spakin verður settur í, og barnagarðurin stendur liðugur.

– Ætlanin hjá bygdaráðnum er at bygja sum skjótast, sigur hon.

Barnagarðurin á Eiði skal byggjast á leiðini, har eldrasambýlið er.

– Neyðugt er í fyrsta lagi at gera ein lítlan vegastubba, so økið verður atkomiligt, sigur hon.

Anna Maria býr í Ljósá, og hon fegnast um, at bygdin fekk reint kelduvatn í skjótt farna valskeiði.

– Men her er eisini ymiskt at taka hond um hjá nývalda bygdaráðnum. Eitt nú verður neyðugt at bøta um vegirnir, og somuleiðis eiga vit at frýðka eitt sindur um í bygdini, sigur hon.

## Ikki nevndarsess

Tá ið nýggja bygdaráðið í Eiðis kommunu, sum tekur við 1. januar 2005, formelt skipaði seg á fundi mánakvøldið - við borgarstjóra, varaborgarstjóra og nevndarumboðum, var Anna Maria ikki við í nakrari av føstu nevndunum hjá kommununi.

Hetta fall í eyguni, og tí ringdi Sosialurin til hennara at fregnast, hvussu hetta hekk saman.

– Hetta hevur einki við ósemju at gera, sigur Anna Maria.

Hon vísir á, at hon sjálv ynskti ikki at vera við í nakrari av føstu nevndunum í kommununi, tí hon frammanundan hevur fleiri álitispostar at røkja sum umboð fyri Eiðis kommunu.

– Eg eri umboð í Korndalsbýlinum, sum er eldrasambýlið á Eiði, Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi, Ráðnum fyri Ferðslutrygd og í stýrinum fyri Felagsskúlan á Oyrarbakka.

Hetta heldur Anna Maria Poulsen vera nóg mikið, og tí ynskti hon ikki at vera við í føstu nevndunum hjá Eiðis kommunu, men annars luttaka í tí arbeiði, sum fer fram í bygdaráðnum.

## Kvinnur og kvinnur

Tað vóru tilsamans fimm listar, sum bjóðaðu seg fram til bygdaráðsvalið í Eiðis kommunu. Millum hesar var eisini ein kvinnulisti, sum ikki fekk serliga stóra undirtøku.

Kvinnur vóru eisini á øðrum listum, og Anna Maria Poulsen varð vald á listanum hjá Tordi J. Niclasen og Rólanti Poulsen.

# Minni pierur byggjast vestureftir



*Avlopsgrót frá dýpingini av ytsta hylinum í Oyrahavnini verður nú lagt einar 15-20 metrar vestur úr verandi pieri*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Í sambandi við arbeiðið at byggja ein lítlan grótarm vestur úr verandi pieri, hevur verið neyðugt at taka niður ytsta partin av grótgarðinum*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

TOFTIR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Arbeiðið við at dýpa og betra um umstøðurnar hjá smærri deksførunum í ytsta hylinum í Oyrahavnini á Toftum gongur sum ætlað.

Meðan arbeitt verður inni í hylinum, eru teir nú eisini byrjaðir at leggja avlopsgrót vestur úr pierinum, soleiðis at grótarmurin í enn størri mun kann verja fyri lágættarbrimi.

Teir, sum standa fyri arbeiðinum í Oyrunum, siga, at grótarmurin, sum fæst burtur úr avlopsgrótinum, verður einar 15-20 metrar langur.

Fyri at kunna leggja grótið út úr pierinum, hevur verið neyðugt at taka ein part av grótgarðinum, sum gongur úteftir pierinum, niður, soleiðis at sleppast kann fram at við lastbilunum, sum koyra grótið av eystursíðuni og yvir á vestursíðuna.

Arbeiðið í Oyrahavnini fer at bøta um umstøðurnar hjá teimum, ið eiga tey smærru deksførini, sum reka útróður av Toftum.